# Íslendskir Formula Off Road á Kongabrúnni

**Fríggjamorgunin 14. mai komu nakrir stórir íslendskir bilar í land av Norrønu við Formula Off Road-bilum í lastini. Mánadagin fóru teir víðari til Noregs, har teir skulu luttaka í einum stórum "treffi" í Vormsund, nærhendis Olso**

OFF ROAD
*Orð og myndir:*
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Larmurin var øgiligur á Kongabrúnni seinasta leygardag, tá fleiri íslendskir



*Tað kundi sæð út, sum um at tað vóru bilvrak, sum stóðu á Kongabrúnni leygardagin, men tað var tað als ikki. Talan var um íslendskar "offroadarar" sum vórðu sýndir fram*

Formula Off Road stóðu við motorunum í gongd á parkeringsplássinum.

Bilarnir, sum vóru sjey í tali, vórðu rættuliga sermerktir á allan hátt - sóu út sum heimagjørdir kassabilar. Teir eru gjørdir til at kunna koyra allastaðni, um tað so er í leysari luft, sum vit síggja á myndunum.

Við í íslendska ferðalagnum vóru eini 30 fólk, sum skulu til Formula Off Road Open í Vormsund í Norra komandi vikuskifti. Har vera tilsamans 46 tílíkir bilar úr Danmark, Svøríki og Norra. Nógvir íslendingar fara við flogfari til Norra at hyggja eftir koyringini í Vormsund - tilsamans verða tey eini hundrað fólk í tali. Kappingin verður leygardagin 22. og sunnudagin 23. mai.

Í Íslandi hava limirnir í Iceland Racing Team "treff" sjey ferðir árliga.





*Bilarnir er sergjørdir og bygdir upp við sterkum rørboylum, so teir tola nógv av undir koyring. Dekkini eru sergjørd til at krintrast í brattlendi og í fjøllunum. Motorarnir eru stórir við fleiri hundrað hestakreftum*



*Tað sær rættuliga ógvusligt, tá íslendarar sýna síni kynstur og vísa hvør dugur er í teimum. Hesin er langt uppi í luftini*

*Mynd: Iceland Racing Team*



*Her eru íslendingarnir, sum eiga og koyra teir sjey Formula Off Road-bilarnar, ið vóru her í vikuskiftinum*

Fire Mermaid

Eldsløkkiútgerð

til smábátar



Skjótt og lætt og við kappingarførum prísum, seta okkara fakfólk upp vælumtóktu eldsløkkiútgerðina Fire Mermaid í smábátar upp til 24m longd.

Til vinnurekandi bátar er krav um at skipanin er sett upp av løggildum fólki. Hesa løggilding hava fakfólk okkara.

Ringið og fáið meir at vita hjá Kristian Martin Jacobsen á tlf. 21 23 86.

STEPHANSSONS HÚS 314291

SKIPASMIÐJAN
Tlf. 301100



# Ákærdur fyri at hava sligið og sparkað

**Eitt mál um harðskap, har ein 43 ára gamal maður er ákærdur fyri at hava sligið og sparkað ein 19 ára gamlan mann, var fyri í Føroya Rætti í gjár**

RÆTTARMÁL
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Hendingin fór fram eina mánanátt í november mánaða síðsta ár í einari størri bygd í Føroyum. Tann 43 ára gamli greiddi í rættinum frá, at han var farin til songar, tá ið hann á miðjari nátt vaknaði av larmi uttan fyri húsini hjá sær. Úr vindeyganum sá hann ein mann róta og sláa í bilinum hjá sær beint uttan fyri húsini, og hann leyp tískil út.

### Viðgongur at hava sligið

Komin út til bilin hjá sær, sigur ákærdi seg hava tikið ein mann úr bilinum. Ákærdi greiddi frá, at tann 19 ára gamli maðurin í bilinum slóg ákærda tvær ferðir, tá ið hann bleiv drigin úr bilinum, og at ákærdi tí lønti honum tað aftur við at sláa fleiri ferðir í andlitið og á kroppin. Sambært ákæruritinum skal tann ákærdi eisini hava sparkað tann 19 ára gamla, men hetta noktaði ákærdi.

Løgreglan arbeiðir í løtuni við málinum um innbrotið í bilin, men tann 19 ára gamli segði í rættinum í gjár, at hann hevði ikki verið í bilinum hjá tí ákærda. Hann sigur seg hava verið á veg til hús, tá ið hann bleiv álopin av ákærda uttan nakra ávaring. Tann 19 ára gamli, sum var ávirkaður av rúsdrekka, segði ákærda hava sligið og sparkað seg fleiri ferðir, áðrenn fólk fóru at rópa eftir ákærda, og tann 19 ára gamli slapp til rýmingar. Ein kvinna, ið býr beint við har, sum hendingin fór fram, greiddi í rættinum frá, at hon hevði sæð ákærda sparkað og sligið tann 19 ára gamla, men hon dugdi ikki at siga, hvussu umfatandi sløgini og sparkini vóru.

Tann 19 ára gamli drongurin greiddi í sínari vitnisfrágreiðing frá, at hann hevði tosað við kvinnuna eftir hendingina, og hon hevði greitt honum frá, hvat hon hevði sæð. Hetta hevði fingið tað heila at hanga betur saman hjá tí 19 ára gamla, sum hevði ógvuliga ilt við at minnast aftur á hendingina í november. Tá ið kvinnan varð avhoyrd í rættinum, segði hon tó, at hon hevði heilsað upp á tann 19 ára gamla eftir hendingina, men at tey ikki høvdu tosað saman um tað, ið fór fram í november mánaða í fjør.

Verjin hjá tí ákærda bað um, at um ákærdi bleiv funnin sekur, at møguleiki var fyri, at dómurin bleiv treytaður, og at ákærdi í staðin fekk nakrar tímar samfelagstænastu. Tí var málið útsett, til ein kanning er farin fram av persónligu viðurskiftunum hjá tí ákærda.

# Minni veiða undir Føroyum

Veiðuhagtølini fyri fyrsta ársfjóðring í ár vísa at virði á til dømis upsaveiðuni er fallið niður um eina helvt av virðinum sama tíðarskeið í fjør. Minkingin í veiðuni merkist longu nú væl í fiksivinnuni bæði á sjógvi og á landi, skrivar heimasíðan hjá Vinnuhúsinum.

Miðal kiloprísurin fyri allar støddir av upsa er lækkaður eina knappa krónu svarandi til 23 prosent. Samstundis er veiðan minka við 5.400 tonsum svarandi til eina lítla helvt. Toskaveiðan er sama tíðarskeið minka 5 prosent í nøgd og 11 prosent í virði. Meðan hýsuveiðan er minka 1 prosent í nøgd og 26 prosent í virði.



Samanlagt er feskfiskaveiðan sum heild minka við 17-18 prosentum bæði í nøgd og virði fyrsta ársfjóðring í ár í mun til sama tíðarskeið 2003.

Verður hugt eftir býtinum á feskfiskaveiðuni eftir skipabólkum ella reiðskapi er týðuligt, at tað er trolveiðan, sum hevur tað stóru minkingina í nøgd og virði. Línuveiðan er hinvegin vaksin 5 prosent í nøgd, men minka 12 prosent í virði

Heldur gongdin fram við so stórum minkingum kemur tað eisini at merkjast í øðrum vinnum og í samfelagnum sum heild, skrivar heimasíðan hjá Vinnuhúsinum.

## Dong á djúpum vatni

Hetta er heitið á fyrilestri, sum Jan Terje Edvardssen, »Senior Vice President, Exploration« hjá danska oljufelagnum DONG, fer at halda á aðalfundinum hjá Oljutinginum 2. juni. Danski serfrøðingurin fer at tosa um stratagiina hjá DONG á Atlantsmótinum og um vánirnar her. Annars verður vanligur aðalfundur, har formaðurin setur tingið og síðani verður val av nýggjari nevnd. Tey, ið ynskja at luttaka, kunnu boða Vinnuhúsinum frá. Øll kunnu vera limur í Oljutinginum, sum er ein áhugafelagsskapur fyri fólk í oljuvinnuni og fyri fólk sum heild, ið hava áhuga fyri oljutilgongdini.

Dong, sum hesaferð verður partur av Oljutinginum, hevur annars víðkað sítt virksemi á Atlantsmótinum nógv seinastu árini. Tað byrjaði við, at felagið kom við í The Faroes Partnership samtakið, ið fekk leitiloyvi í 1. Rundu.

Síðani hevur felagið víðkað sín leiklut og er partur av 9 ára loyvinum, sum Statoil stendur fyri og felagið er so eisini við í fleiri loyvum á bretska landgrunninum, eitt nú loyvum, har tað verður borað í summar. Samanumtikið kann sigast, at DONG er eitt av teimum virknu oljufeløgunum um okkara leiðir, og okkurt bendir á, at felagið ætlar sær ikki at minka um sítt virksemi, heldur tvørturímóti.

HALDIÐ SOSIALIN

Undirritaði teknar seg sum haldara av Sosialinum, og fær blaðið 5 ferðir um vikuna.

Navn: ____________

Bústaður: ____________

Postnr.: ____________

Bygd/býur: ____________

Telefon nr.: ____________

Undirskrift: ____________

Ókeypis
Verður sent ópostað
Sosialurin rindar postgjaldið

64

Sosialurin
Postsmoga 76
110 Tórshavn

400,- um ársfjórðingin
- sparið 450,- í mun til leysasølu

600,- kr. um ársfjórðingin í Danmark
(500,- kr. fyri 1 ferð um vikuna - 5 bløð)

Sosialurin

ARGJAVEGUR 26 · POSTSMOGA 76 · 110-TÓRSHAVN · TEL 341800 · FAX 341801
POST@SOSIALURIN.FO · WWW.SOSIALURIN.FO